# MBM Búrøkt hevur jólagávurnar

**MBM Búrøkt hava í nýggja bygninginum stóran handil við vørum til landbúnaðin, so sum vørur til ross, seyð, hundar, kýr og m.a., og eisini sláimaskinur, traktorar, plenuklipparar, arbeiðsklæðir og ymisk amboð**




MBM er eitt lutafelag, sum varð stovnað tann 25. oktober 1977 undir navninum Mjólkarvirki Búnaðarmanna. Mjólkarvirkið í Hoyvík var byrjanarskotið til Meginfelag Búnaðarmanna. Tað fór undir at framleiða tann 1. apríl 1980. Navnið varð síðan broytt til Meginfelag Búnaðarmanna, stytt MBM.

MBM var eina tíð í 4 deildum: tveimum framleiðsludeildum og tveimum innkeyps-, sølu- og tænastudeildum. Í dag koyrir virkið í tveimum deildum, einari framleiðslu- og einari søludeild.

Harafturat kemur leiðsla og marknaðarførsla.

Mjólkarframleiðarar eru lutaeigarar í felagnum men hóast felagið er lutafelag, er tað rikið sum eitt partafelag. Munurin er helst eigaraviðurskiftini, at bert mjólkarframleiðarar kunnu eiga lut/part í felagnum og tá eftir mjólkarnøgd/kvotu.

### Bygdu nýggjan bygning

Tá vit fluttu í nýggja bygningin, valdu vit at laga felag okkara soleiðis, at vit eftir henda dag hava tvær deildir, eina framleiðslu- og eina søludeild.

Framleiðsludeildin er Mjólkarvirkið, sum hevur verið síðani byrjanina við MBM.

Søludeildin, sum umfatar fóðursøluna, handilin og verkstaðið, kallast BÚRØKT.

Í 1997 varð ein útbygging gjørd, sum tvífaldaði gólvvíddina og framleiðslu-orkuna.

1987 fór MBM undir at keypa og selja kraftfóður, handilstøð o.a. til landbúnaðin. MBM-Fóður hevði leingi heimstað á bryggjuni í Kollafirði, men eisini var fóðursøla á Mjólkarvirkinum í Hoyvík og hjá ymiskum umboðum kring landið. Eisini var og er handlað við amboðum og útgerð til húsdjórahald.

Í januar 2003 brann fóðurbygningurin í Kollafirði í grund og eftir brunan húsaðist deildin á Búnaðardeplinum í Kollafirði í 2 ár, inntil flutt varð til Hoyvíkar.

MBM Búrøkt hava í nýggja bygninginum stóran handil við vørum til landbúnaðin.

- Í úrvalinum hava vit vørur til Ross, seyð, hundar, kýr og m.a., og eisini sláimaskinur, traktorar, plenuklipparar, arbeiðsklæðir og ymisk amboð.

### Jólagávuhugskot

Millum maskur og útgerð til teirra, ið fáast við landbúnasð og djór, so er óivað eitt gott hugskot at hyggja innar hjá MBM Búrøkt, ber heilt víst til at finna røttu gávurnar til teirra, ið fáast við slíkt, og har er veruliga ymiskt, ið kann tendra jólaljós í eygunum á bóndanum, húsbóndanum, og óivað so mongum øðrum eisini.

MBM Búrøkt hevur ment seg og er avgjørt eina vitjan verda.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















